LM-006/2025

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Tórshavn, 5. januar 2024

Viðv. Gjaldsskipan til nýtt náttúruverndargjald
Í 2019 legði Visit Faroe Islands fram eitt uppskot til loysn um skipaða hagagongd. Í stuttum var tilmælið viðv. gjaldsskipan at leggja eitt náttúruverndargjald á øll ferðafólk, ið koma til landið og at oyramerkja inntøkuna til náttúruverndarátøk.

Tað eru ymiskir hættir at krevja inn slíkt ferðafólkagjald. Til ber at skilja millum tveir yvirskipaðar hættir, ið vanliga verða nýttir kring heimin: 1) Avgjald á ferðing og 2) Avgjald á gisting. Summastaðni verða bæði avgjøldini brúkt í eini samanseting, meðan tað aðrastaðni bara er avgjald á t.d. gisting.

Niðanfyri lýsa vit yvirskipað nakrar fyrimunir og vansar við báðum skipanunum. Hetta er ikki ein gjøllig lýsing og tað er neyðugt at kanna nærri, hvussu skipanirnar ítøkiliga kunnu setast í verk, áðrenn til ber at siga endaliga, hvørjir fyrimunirnir og vansarnir eru og harvið eisini, hvat endaliga tilmælið eigur at vera.

Avgjald á ferðing
Visit Faroe Islands hevur sum útgangsstøði altíð mett, at skilabesti háttur at krevja inn gjald frá ferðafólki í Føroyum, er við at brúka upplagda møguleikan vit sum oyggjasamfelag hava, nevniliga við at krevja inn í sambandi við komu ella fráferð úr Føroyum, t.e. sum flogvallar- ella havnaskattur ella sum avgjald á ferðaseðilin.
Tað eru fleiri eyðsæddir fyrimunir við slíkari skipan:

- Vit tryggja okkum at øll ferðafólk verða fevnd av gjaldinum
- Tað er ein einføld skipan, ið ikki krevur eftirlit ella stórvegis umsiting. T.e. ein effektiv skipan ið tryggjar støðuga inntøku.
- Vit byggja víðari á skipanina sum longu er í gildi við núverandi ferðaavgjaldi
- Skipanin er gjøgnumskygd og er løtt at handhevja
- Samlaða inntøkukravið/fíggingartørvurin kann tryggjast við einum munandi lægri avgjaldi á hvønn ferðandi, sammett við gistingarskattin.

Størsti vansin við hesi skipan er, sum vit síggja tað, at tað kann vísa seg at vera ein avbjóðing at finna fram til smidligar skipanir, ið gera mun á føroyingum og útlendingum, um tað er politiska ynskið. Talgildu Føroyar hava upplýst, at tað tekniskt ber til at brúka talgilda samleikan til at tryggja føroyingum avgjaldsfrítøku. Hvussu hetta verður gjørt í praksis og hvussu føroyingar ið flúgva við øðrum flogfeløgum enn Atlantic Airways, kunnu keypa ferðaseðil uttan náttúruverndargjald, má kannast nærri um tað verður hendan loysnin ið verður vald.

Avgjald á gisting
Hin møguleikin, at seta í verk nýtt avgjald, ið verður lagt omaná gisting, er ein kend skipan, sum er sett í verk í nógvum londum, býum ella kommunum. Vit meta tað eisini er møguligt at finna eina smidliga skipan til føroysk viðurskifti, um hetta er ynskið. Vanliga er talan um eitt regionalt ella kommunalt avgjald. Á meginlandinum í Evropa er hetta ein vanligur leistur, meðan tað enn ikki er nakað norðurlendskt land sum hevur avgjald á gisting.

Fyrimunurin við hesi skipan er

- At hon rakar ein smalri málbólk, nevniliga einamest útlendsk ferðafólk sum koma til Føroya.
- Tað er ein skipan, sum ferðafólk kenna frá øðrum londum og tískil lætt verður góðtikin.

Vansarnir eru tó fleiri:

- Inntøkugrundarlagið er avmarkað, eftirsum tað bara eru fólk sum gista, ið rinda. Fólk við ferðafólkaskipum, fólk sum hava egnan húsvogn ella tjald og fólk sum gista hjá vinum ella kenningum rinda ikki nakað avgjald. Skal avgjaldið geva eina munagóða inntøku er sostatt neyðugt at seta tað hægri enn tað fólk kenna úr øðrum londum (millum 4-50 kr. um náttina)
- Slík skipan er lutfalsliga tung at umsita og hava eftirlit við, tá avgjaldið skal krevjast inn frá einum stórum skara av veitarum, ið somuleiðis verða álagdir eina eyka umsiting og avgreiðslu.
- Hetta er ein nýggj skipan, ið hevur við sær ein ókendan kostnað ísv. verksetanina, m.a. tá tað kemur til møguligar tekniskar tillagingar hjá veitarum, m.a. ísv. bóking
- Tað er ivasamt, hvussu privat útleiga (serliga airbnb) skal handfarast í mun til slíkt avgjald.
- Avgjaldið verður bara lagt á tey ferðafólk, sum frammanundan leggja mest eftir sær. Vit ynskja ferðafólk til Føroya, sum steðga leingi og eitt avgjald fyri hvørt samdøgur ger tað eitt vet verri at velja longra steðgin í Føroyum.

Tilmæli

Visit Faroe Islands metir, at vit best røkka ágóðunum, sum eitt náttúruverndaravgjald hevði havt við sær, við at seta í verk eitt náttúruverndargjald, ið verður kravt inn við fráferð ella komu til Føroyar.

Visit Faroe Islands mælir tó frá at seta í verk gjaldsskipanir, ið gera mun á føroyingum og útlendingum. Orsøkirnar eru fleiri:

- Tað er trupult at skilmarka, hvør er at rokna sum føroyingur og tað slepst ikki undan óhepnum støðum, tá munur verður gjørdur á fólki við støði í samleika teirra.
- Tað er munandi truplari og dýrari at seta í verk og umsita eina skipan, ið ger mun á ferðafólki.
- Náttúruverndargjaldið kann verða sett munandi lægri fyri at røkka somu inntøku, um vit geva øllum ferðandi somu treytir.
- Øll ferðing kostar umhvørvinum eins nógv og tað er lætt at grundgeva fyri, at øll sum ferðast rinda eitt ávíst avgjald fyri hetta.

Samanumtikið mælir Visit Faroe Islands til at seta í verk eitt einfalt náttúruverndargjald, sum er galdandi fyri øll ferðandi til Føroyar. Hetta meta vit vera eina einfalda og gjøgnumskygda loysn sum er løtt at seta í verk, at umsita og at hava eftirlit við.